# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**29. partur**

Seinast hevði eg frammi um tann álvarsama dóm, ið Zefanias talar um Juda og Jerúsalem, og hvussu skjótt hann gekk út. At hann eisini prætikar um dóm, sum liggur langt frammi í tíðini,og sum vissuliga fer at ganga út eisini. Jesus talar sjálvur um tann svára dóm, sum koma skal yvir henda heim o.s.fr.

Tað er syndin, sum ger, at dómurin kemur. Eg nevndi um Sodoma og Gomorra, og at tað, sum sermerkti ta tíðina, var siðloysi. Zefanias nevnir bæði Sodoma og Gomorra í øðrum kapitli. Og í seinra brævi sínum sigur ápostulin Pætur hetta:

Býirnar Sodoma og Gomorra legði Hann í øsku og dømdi teir til undirgang; Hann setti teir soleiðis teimum til fyridømi, sum á komandi tíðum vildu liva í gudloysi. Kap. 2 Vers 6.

Hetta er háaktuelt fyri okkum her í Føroyum at taka til eftirtektar. Eg øtist, tá ið eg hoyri mangt av tí, sum verður sagt alment í dag. Tað er fari út um øll mørk viðvíkjandi sámuligheit. Synd hevur altíð verið, men hetta, at spæla við syndina og samstundis forsvara hana, sum nakað gott er ræðuligt. Tá ið so fylgjurnar koma, so verður tosað um, hvussu vandamálini skulu loysast, og loysnirnar eru bæði tápuligar og ræðandi. Hvar enda vit. At spæla við hesi viðurskifti sum ung og so royna at loysa vandamálið við t.d. eini fosturtøku og taka lívið, sum skaparin hevur skapt, er so álvarsamt og so drepandi fyri tey ungu og ein og hvønn, sum ger tað, at tað er neyðugt at rópa eitt hart varðskó.

Vit hava nú í hesum stubbum lisið nógv um dómin, sum kom yvir Ísrael, Juda og Jerúsalem, og at hann kom av synd teirra. Esaias profetur sigur hesi orðini í 3. kapitli 9. versi: Andlitsbragd teirra talar - og vitnar ímóti teimum, og sum fólkið í Sodoma tosa tey opinlýst um synd sína, tey dylja hana ikki. Vei sálum teirra, tey stoyta sær sjálvum í vanlukku.

Er ikki okkurt betri at hjálpa okkara ungu við, enn okkara býttu loysnir, sum menniskju. Vit kunnu ongum hjálpa, tá ið um so álvarslig mál ræður. Ikki eg og ikki tú, vit standa hjálparleys. Men vit hava tó eina loysn, sum vit kunnu brúka við dirvi. Bíblian, hin gamla bókin, er og verður einasta loysnin, hon, sum sigur okkum frá Frelsaranum. "Kristus er svarið til heimsins stóru neyð" syngja vit. Bíblian sigur okkum viðurskiftini, sum tey eru, hon kávar ikki útyvir nakað. Vit hava nú farið ígjøgnum skriftirnar og hava lisið nógv um dóm, men eisini um lyftini, til tey sum venda við og eru Gudi lýðin. Mátin at vera Gudi lýðin er at akta orðið.

Bíblian, tann innblásta bókin, hevur ta einastu loysnina. Lat okkum til seinast lesa 2. kapitul í orðtøkunum:

Sonur mín! Tekur tú við orðum mínum og goymir boð míni hjá tær, so tú vendir oyra tínum til vísdóm og boyggir hjarta títt til klókskap, ja, kallar tú á vitið og rópar hart eftir klókskapinum,

leitar tú eftir honum sum eftir silvuri, og grevur tú eftir honum sum eftir dýrgripum, so skalt tú skilja, hvat tað er at óttast HARRAN, og vinna tær kunnskap um Gud.

Tí HARRIN er tann, sum gevur vísdóm, av munni Hansara koma kunnskapur og vit; Hann goymir hinum sannhjartaðu lukku, Hann er øllum teimum skjøldur, sum liva ólastandi!

Hann vakir yvir gøtum rættarins og varðveitir veg hinna heiløgu Sína. Tá skalt tú skilja rættvísi, rætt og rættsinni, ja, eina og hvørja góða leið. Tí vísdómur skal koma í hjarta títt, og kunnskapur skal gleða sál tína; skil skal halda vakt yvir tær, vit skal vera verja tín - at bjarga tær frá ringum leiðum, frá fólki, sum talar tað, ið rangvørgt er, frá teimum, sum fara av rættvísileiðum og ganga á gøtum myrkursins, sum hava gleði av at gera ilt og rópa av gleði um tað, ið rangvørgt og ónt er, sum ganga á sniðgøtum og fylgja rangvørgum leiðum.

Vísdómurin skal frelsa teg frá konu annars mans, frá fremmandari kvinnu við sleiskum orðum, sum hevur svikið ungdómsvin sín og gloymt sáttmála Guds síns.

Tí hús hennara søkkur niður í deyðan, og vegir hennara ganga niður til deydningarnar; aftur kemur eingin, ið inn til hennara fer, teir náa aldri leiðum lívsins. Vísdómurin skal hjálpa tær at ganga vegin, ið hini góðu ganga, og halda teg á leiðum rættvísra. Tí hini sannhjartaðu skulu búgva í landinum, og hini ólastandi skulu verða eftir í tí; men hini gudleysu skulu verða beind av landinum, og hini trúleysu skulu verða rykt burtur úr tí.

**Framhald**

# Hvat ætlar samgongan við læknavaktini?

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



**Sambandsflokkurin royndi saman við hinum andstøðuflokkunum at gera alt fyri at fáa betra um læknavaktarskipanina í Norðoyggjum og Eysturoynni í samband við fíggjarlógarviðgerðina seint í vár. Men eingin áhugi var frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum og samgongufeløgum hansara at taka undir við uppskotinum. Tí nakrar viðmerkingar og spurningar**

Verandi læknavaktarskipan virkar fjar frá brúkaranum, er ov nógv miðsavnað um Landssjúkrahúsið, leggur óskipað og nógv trýst á vaktarskipanina á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og skapar harvið ótryggleika og ónøgd millum brúkarar og starvsfólk. Skipanin elvir eisini til nógva óneyðuga og mangan vanda koyring, framvið Klaksvíkar Sjúkrahúsi til Havnar.

Neyðugt er tí, á ein skipaðan hátt at fáa Klaksvíkar Sjúkrahús meira við í læknavaktarskipanina, fyri at fáa hana at virka og gerast trygga. Sleppast má undan óneyðugu og vandamiklu koyringini á Landssjúkrahúsið, soleiðis at brúkarin framyvir fær eina betri og tryggari tænastu og starvsfólkini fáa rímuligari arbeiðsumstøður.

Landsstýrismaðurin á økinum hevur á Løgtingi viðgingið, at skipanin ikki er nøktandi, og at tað er neyðugt at fáa Klaksvíkar Sjúkrahús meira við. Eisini hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann arbeiðir við eini loysn. Men tað letur tíverri ikki til, at ætlanir eru um at gera nakað við hendan átrokandi spurning í bræði. Úrslit síggjast í hvussu er eingi.

**Styrkja um forvaktina á Klaksvíkar Sjúkrahúsi**

Bæði í álitinum í samband við fíggjarlógarviðgerðina frá fíggjarnevndini og við uppskoti millum aðru og triðju viðgerð, varð frá Sambandsflokkinum skotið upp at játta pening til at styrkja um forvaktina á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, soleiðis at sjúkrahúsið í størri mun kann taka sær av læknavaktarskipanini partin av døgninum, tá ið kommunulæknarnir ikki eru til arbeiðis.

Sambært royndum starvsfólki á økinum, fer ein slík loysn at gera læknavaktarskipanina nógv tryggari fyri brúkaran, arbeiðsumstøðurnar munandi betri hjá starvsfólkunum og óneyðuga og vandamikla koyringin til Havnar heldur uppat. Kostnaðurin fyri skipanina er einans góðar 3 mió. krónur árliga.

**Kommunulæknatrot ein orsøk til trupulleikarnar**

Tað hevur leingi verið trupult at fáa kommunulæknar settar í starv í Føroyum. Sambært landsstýrismanninum er tað ein av orsøkunum til at trupult er at fáa læknavaktarskipanina at virka nøktandi.

Lættari hevur verið at manna hjálparlæknastørvini á sjúkrahúsunum. Men gongdin undir verandi læknavaktarskipan í Norðoyggjum og pørtum av Eysturoynni ger, at læknar heldur ikki støðast á sjúkrahúsinum. Tí óskipað trýst verður lagt á forvaktina har. Tað hevur tí miklan skund at fáa hesi viðurskifti í rættlag fyri at fyribyrgja, at virksemið á sjúkrahúsinum eisini fer fyri bakka.

Verður tað úrslitið, stendur norðurøkið heilt á berum, tá um bráðfeingis læknahjálp ræður og tað kann als ikki góðtakast.

**Spurningar til landsstýrismannin Hans Paula Strøm. Spurningar til landsstýrismannin**

Landsstýtismaðurin boðaði á Løgtingi frá at læknavaktarskipanin í Norðoyggjum og pørtum av Eysturoynni ikki virkar nøktandi. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at skipa læknavaktarskipanina í Norðoyggjum og pørtum av Eysturoynni, fyri at fáa skipanina at virka eftir ætlan?

Nær verður nakað munagott gjørt, soleiðis at norðurøkið fær eina nøktandi og trygga læknavaktarskipan, bæði fyri brúkara og starvsfólk?

Við vón um at landsstýrismaðurin svarar greitt og at úrslit fara at spyrjast skjótt.

# Grundstykkjaprísirnir við Karlamagnusarbreyt

HØGNI MIKKELSEN
býráðslimur



Nú hoyri eg í miðlunum, at grundstykkini við Karlamagnusarbreyt koma at kosta 575 túsund krónur, og eg má siga, at tað er skelkandi at hoyra, at prísurin er so høgur.

Eigarafelagið hevur heldur ikki hoyrt henda høga kostnaðin nevndan fyrr, so eg skilji væl, at tey ikki kunnu góðtaka henda høga prís.

Grundin til at kommunan ger sethúsaútstykkingar er sera einfald, tað er fyri at borgararnir kundu ogna sær eitt grundstykki fyri sámuligan kostnað. Ikki kann sigast, at soleiðis er við hesari útstykkingini.

Sum býráðslimur má eg siga, at eg havi ongantíð hoyrt, at hesi grundstykki skuldu kosta so nógv, men á onkrum fundi er nevnt eitt tal um 300 túsund krónur. Tað er ein rímiligur kostnaður fyri eitt 300 fermetra stórt stykki, har 100 fermetrar eru lagdir til fríøki. Eg veit ikki hvør tað er, sum hevur gjørt at tað skal vera so kostnaðarmikið at ogna sær eitt grundøki við Karlamagnusarbreyt, men tað eiga vit býráðslimir at fáa at vita.

Henda samgongan, sum nú stýrir kommununi, hevur als ikki skil á fíggjarstýring, tað síggja vit á íløgunum, sum skulu gerast í kommununi. Einki óført, tá onnur skulu gjalda, er hugburðurin hjá Javnaðar- og Tjóveldisflokkinum í Tórshavnar Kommunu.

Vónandi fáa tit, ið hava fingið tillutað grundstykki við Karlamagnusarbreyt, broytt útstykkingina soleiðis, at stykkini koma at kosta um 300 túsund krónur.

Góða eydnu víðari.